
Aktiónin, ein stór skomm:

Hetta geri eg ongantíð aftur

– sigur Bjørn av Heygum, aktiónsleiðari. Tá eg skuldi fara eftir lutunum, eg hevði lýst á aktión, vóru teir burtur



-Hetta geri eg ongantíð aftur, sigur Bjørn av Heygum, aktiónsleiðari, sum heldur, at aktiónin var stór skomm. Mynd: Kalmar



AUKTIÓN

Niðanfyri tilskilaðu bilar verða við hesum lýstir til sølu á tingsalssølu, sum verður haldin á skrivstovu hjá P/F Bilhúkan, Velbastaðvegur 78, Tórshavn

leygardagin tann 14. mai 1994 kl. 10.00

1 persónbilur Daihatsu
1 verubussur Renault Traffic
1 verubussur Mercedes 409
1 persónbilur Ford Sierra
1 persónbilur Toyota Corolla, árg. 1984
1 persónbilur Nissan Stanza, árg. 1984
1 persónbilur Honda
1 verubilur Toyota Hiluxe
1 taxabilur Mercedes 190
1 persónbilur Golf, árg. 1987
1 persónbilur Golf, árg. 1987
1 persónbilur Nissan Micra
1 verubilur Nissan Sunny, 7 ár
1 persónbilur Mazda

Niðanfyri tilskilaðu lutir verða við hesum lýstir til sølu á tingsalssølu, sum verður haldin í Gundadalshøllini, Tórshavn.

leygardagin tann 14. mai 1994 kl. 14.00

1 8-mannafar
1 kompressari Atlas Copco 15-18 ár
1 gravimaskina Fiat Allis FR 20
Vibrator SRX 70
1 multibrækker BH 13
1 traktorur ISEKI TX-1500
1 traktorur ISEKI TX-1500
Ymiskar prentmaskinur, sosum:
1 prentmaskina Heidelberg Kors
1 Bettroquick model 801S
1 Kniwz Polar type 7704
1 Repromaster 3500
1 Copyproof typa WD 37
1 Densitymeter Gretag D 180
1 rammaskina mrk. «Bam»
1 maskina ELO, rundsag v/ borði
1 mixerpult Elektrovox EX 100
2 hátalarar og 2 hátíðeysir
2 fastar mikrofonir
1 kaffiautomat Wittenberg
1 páhangsmotorur 4 hk
1 heyslast MAN, árg. 89
1 kranalastbilur MAN
1 byrsa, dubbelt
1 fóðurautomat Legrain 2000
Fóðurhestur FS 100 Seristad
Vossakasso tilhoyr til sláimaskinu
1 vakumpakkimaskina
1 Con-Evator mrk. Lobatek
1 klæver, hvítt mrk. Young Clang
1 orgul, 1990
1 uppvaskimaskina
1 luftovnur
1 videobandupptaken AIWA
1 sjónvarp, Blaupunkt
1 sjónvarp, Marsleo
1 framvísari Kodak 2050 Dias
Trolnet
Plottari
1 IBM PC VP við printara IBM 2380 og skermi
1 teldu, Amstrad
50 tendrarar
1 kassaapparat
Hillar
1 diskur
Skrivibordi, køksbordi og reolir
3 stk. skrivvaraborð mrk. «Labofa»

Hetta er bert ein partur av tí, tó verður selt.

Harumframt verður auktión yvir burturmistar lutir (hillegoids)

Auktórsfreytmar eru, at goldið verður KONTANT (í reiðum peningi/kekk) í sambandi við sjálvt uppropið

Lutmir kunnu synast og eftirkannast á staðnum ella nærri avtalu við undirtaða auktórsleiðara.

Tórshavn, tann 28.04.1994

Sum auktórsleiðari:
Bjørn á Heygum
adh.

Fleiri hundrað fólk møttu upp á aktiónunum, tí har var nógv at velja ímillum. Væl at merkja sambært lýsingina



Gravkúgvin fór fyri 50.000 krónur og lastbilurin fyri 5.000. Mynd: Kalmar

Fjúrtan bilar og bussar skuldu seinasta leygardagn seljast á aktión í Havn. Hetta var fráboðað í lýsing frá Bjørn av Heygum, aktiónsleiðara, og ikki var løgið, at fólk úr øllum ættum møttu fjølment á Bilfríðkan, har bilaktiónin skuldi vera.

Men flestu teirra fóru nakkalong heimaftur, og lagið var heldur ikki tað besta. Tey hildu seg vera hildin fyri tað turra spott, tí har vóru ikki teir fráboðaðu fjúrtan bilarnir, men bert tríggir.

Stór skomm

Bjørn av Heygum dylur ikki, at sjálvur kendi hann seg illa hendan dagin.

-Hetta var stór skomm, og hetta sama, sum hendi leygardagin, skal ikki henda aftur, sigur aktiónsleiðarin sum leggur aftrat, at hasara partur av skyldini fyri tað sum hendi var, at hann hevur verið ov naivur.

-Tað sum hendi er, at tær ymisku advokatskrivstovurnar panta fyri lánveitaran, men taka kortini ikki lutin, sum verður pantaður, í varðveitslu fyrr enn beint áðrenn aktiónin skal vera. Og tá er tað í mongum førum hent, at luturin tá er burtur. Hann kann enntá verða seldur øðrum.

-Eg roknaði avgjørdur við, at teir lutir, eg hevði sett í lýsingina, vóru til staðar tá aktiónin skuldi byrja, men so var ikki, hóast eg frammanundan hevði vent mær til advokatskrivstovurnar, eg skuldi selja lutirnar fyri, júst fyri at tryggja mær, at lutirnir vóru har. Og tað fekk eg eisini váttan fyri, sigur Bjørn á Heygum. Hann leggur aftrat, at hann hevur ivaleyst verið ov naivur.

Ongantíð aftur

-Hetta geri eg ongantíð aftur. Áðrenn eg seti nakran lut í aktiónslýsing aftur, vil eg bæði síggja lutin og nema við hann fyri at tryggja mær, at fólk ikki enn eina ferð koma á aktión har útboðið ikki samsvarar við tað, sum lýsingina boðaði frá.

tór.-

Fólkafundur á Gøtueiði

Annan hvítusunnudag skipar Lions Club Eysturoy fyri stórum fólkafundi á Gøtueiði.

Á fundinum, ið byrjar kl. 15 og er almennur, verða tveir talarar – Jógvan Fríðriksson, prestur, og Sverri Egholm, bókavørður.

– Tankin aftan fyri hetta tiltakið er fyrst og fremst at fáa fólk at koma saman, so lív aftur kann koma í meira fornar siðir, ið vit eiga her á landi, sigur Niklas Foldbo, Lions Club Eysturoy.

– Fólkafundir vóru nógv meira vanligir fyrr, og teir høvdu eisini so avgjørt eina ávísa ávirkan á bæði fólkalív og mentan, og tað eru virði, vit áttu at gjørt meira við og fingið meira burturúr í hesum døgum.

Høvið verður eisini annan hvítusunnudag at fáa ein drekkamunn við onkrum góðum afturvið, og ætlanin er eisini at havaokkurt gott til børnini.

hj.

(Tilvildarliga vald mynd)

